*Seinast dagført: Jan. 2023*

Endamálið við hesum politikki er at lýsa, hvussu vit savna, nýta og goyma tínar persónsupplýsingar, umframt hvussu vit verja hesar upplýsingar og hvussu tú kanst fremja tíni lógarásettu rættindi. Vit taka øll fyrivarni fyri at verja tínar persónsupplýsingar sambært galdandi lóggávu.

**Dátuábyrgdari**

Hvalbiar Kommuna er dátuábyrgdari. Allir spurningar og viðurskifti viðvíkjandi persónsupplýsingum og dátutrygd ella møgulig trygdarbrot skulu stílast til:


**Hvalbiar Kommuna**

**Bíarvegur 2**

**850 Hvalba**

**Teldupostur: hvalba@hvalba.fo**

**Tlf: +298 37 50 33**


Um tú hevur spurningar um okkara viðgerð av persónupplýsingum, ert tú altið vælkomin at seta teg í samband við okkum.

**Innsavning av persónsupplýsingum**

Persónsupplýsingar eru øll sløg av upplýsingum, sum beinleiðis ella óbeinleiðis kunnu eyðmerkja ein fysiskan (livandi) persón, t.d. navn, bústaður, teldupostur og telefonnummar. Tað kann eisini vera ymisk sløg av elektroniskum dátum sum IP-adressa og MAC-adressa, um hesi kunnu knýtast til ein fysiskan persón.

Vit savna persónsupplýsingar á ymsan hátt, men aloftast er tað beinleiðis frá tær.

**Hvørjum persónsupplýsingum hava vit tørv á?**

Júst hvørjar upplýsingar vit viðgera, valdast endamálið við viðgerðini. Vit kunnu viðgera niðanfyri standandi bólkar av persónsupplýsingum, um tað er neyðugt fyri at loysa okkara uppgávur:

**Vanligar persónsupplýsingar:** Upplýsingar sum eitt nú navn, bústað, teldupostadressu, telefonnummar, matrikkulnummar o.a.

**Viðkvæmar persónsupplýsingar um**

• húðarlit, ættarslag ella etniskan uppruna

• politiska, átrúnaðarliga ella heimspekiliga sannføring

• yrkisfelagsligt tilknýti

• ílegudátur

• biometriskar dátur (við tí endamáli eintýðugt at eyðmerkja ein persón)

• heilsuupplýsingar

• upplýsingar um kynslig viðurskifti, revsiverd viðurskifti, ella

• upplýsingar um munandi sosialar trupulleikar og onnur heilt privat viðurskifti

**Upplýsingar, sum verða savnaðar í samband við viðgerð**

Í flestu førum fáa vit upplýsingarnar beinleiðis frá tær. Vit kunnu eisini fáa upplýsingar frá eitt nú

• myndugleikum, stovnum og fyritøkum

• skúlum og dagstovnum

• skráum, t.d. Fólkayvirlitið og Akfarsskráin og

• frá øðrum borgarum

**Viðgerðarheimild**

Øll okkara viðgerð av persónsupplýsingum fer fram sambært galdandi lógarreglum, og er henda viðgerð grundað á fylgjandi:

• DVL § 8, stk. 1, nr. 2, 3 ella 5 (vanligar persónsupplýsingar) • DVL § 12, stk. 1, nr. 2, 3, 6 ella 7 (viðkvæmar persónsupplýsingar) • DVL § 16 (p-talið)

Umframt ásetingunum í DVL, eru serligar reglur galdandi fyri viðgerð av persónsupplýsingum á einstøkum lógarøkjum. Tá ið slíkar serreglur eru galdandi, fylgja vit sjálvsagt eisini hesum reglum.

**Samtykki**

Í einstøkum førum hava vit tørv á samtykki frá tær fyri at viðgera persónsupplýsingar um teg. Til dømis er neyðugt við samtykki frá tær, um vit vilja nýta eina mynd av tær ella tínum barni á okkara heimasíðu. Slíkt samtykki verður fingið til vega sambært ásetingunum í DVL § 9.

**Hvussu leingi goyma vit tínar persónsupplýsingar?**

Hvalbiar kommuna hevur skyldu til at varðveita upplýsingar í málum, fyri at skjalfesta málsviðgerðina. Hetta er krav sambært fyristingarlóggávu, skjalasavnslóggávu v.m. Síða 5 av 6 Vit strika tínar upplýsingar, tá ið vit ikki hava tørv á teimum longur. Tínar upplýsingar verða sum oftast goymdar líka leingi sum sjálvt málið, ið upplýsingarnar eru partur av. Hetta er í flestu førum fimm ár, frá tí at málið er liðugt viðgjørt. Á summum økjum kann styttri ella longri strikingarfreist vera ásett í lóg.

**Víðarilatan av persónsupplýsingum**

Vit deila í ávísum førum tínar persónsupplýsingar við triðjapartar. Hetta kann vera við almennar myndugleikar, tá hetta er álagt okkum í galdandi lóggávu, ella við uttanhýsis samstarvspartar, um vit hava títt samtykki, ella vit hava ein lógarásettan rætt til tað.

*Samstarvspartar og KT-veitarar:*

Vit nýta eina røð av KT-tænastum og -skipanum. Í fleiri av hesum skipanum viðgera vit persónupplýsingar. Summar av hesum skipanum verða hýstar lokalt, ímeðan aðrar verða hýstar hjá veitaranum ella í cloud-loysnum. Vit tryggja okkum, at tíni rættindi eru vard og at trygdarstøðið verður varðveitt í sambandi við slíkar dátuflytingar.

**Tíni rættindi**

Tú hevur sambært Dátuverndarlógini eina røð av rættindum í mun til okkara viðgerð av tínum persónsupplýsingum:

**Rætt til at afturkalla eitt samtykki**

Um okkara viðgerð av tínum persónsupplýsingum er grundað á samtykki frá tær, hevur tú altíð rætt til at afturkalla títt samtykki. Tá ið tú afturkallar títt samtykki, steðga vit at viðgera tínar persónsupplýsingar, sum var grundað á samtykki.

Gev gætur, at um tú afturkallar eitt samtykki, eru vit møguliga ikki før fyri at veita tær eina ávísa tænastu.

**Rætt til striking**

Í serligum føri hevur tú rætt til at biðja um at fáa strikað persónsupplýsingar, sum vit hava um teg. Rætturin er ikki treytaleysur, tá ávísar upplýsingar ikki mugu strikast, grundað á aðra lóggávu, ella um avtala og ávíst endamál gevur okkum rætt til at varðveita og viðgera persónsupplýsingarnar.

**Rætt til innlit**

Tú hevur rætt til at fáa at vita, hvørjar upplýsingar vit hava um teg. Rætturin til innlit krevur tó, at vit kunnu eyðmerkja serstøku upplýsingarnar um teg. Tað kann tískil vera neyðugt hjá

tær at geva okkum supplerandi upplýsingar, um so er, at vit ikki kunnu eyðmerkja teg út frá teimum upplýsingunum vit hava.

**Rætt til viðgerðaravmarking**

Í serligum føri hevur tú rætt til at biðja um at fáa viðgerðina av tínum persónsupplýsingum avmarkaða. Hetta merkir, at um treytirnar til viðgerðaravmarking eru uppfyltar, at vit einans kunnu viðgera tínar peronsupplýsingar í serligum førum.

**Rætt til mótmæli**

Tú kanst átala, at persónsupplýsingar um teg verða viðgjørdar. Um átalan má metast heimilað, skulu persónsupplýsingarnar um teg ikki viðgerast. Tó kunnu upplýsingarnar møguliga framvegis nýtast til at viðgera møgulig onnur lóglig endamál.

**Rætt til rætting**

Tú hevur rætt til at biðja um at fáa rættað persónsupplýsingar, sum eru rangar ella villleiðandi, soleiðis at vit ikki viðgera upplýsingar um teg, sum eru skeivar ella ófullfíggjaðar.

**Rætt til dátuflutning**

Tú kanst biðja um at fáa tær persónsupplýsingar, sum tú hevur latið okkum, latnar tær í einum skipaðum, vanliga nýttum og teldutøkum sniði.

**Samband og kærumøguleikar**

Tú ert altíð vælkomin at seta teg í samband við okkum, um tú hevur spurningar um tíni rættindi, og hvussu vit skráseta og brúka tínar persónsupplýsingar. Tú kanst seta teg í samband við okkum soleiðis:

**Teldupostur: hvalba@hvalba.fo**

**Hvalbiar Kommuna**

**Bíarvegur 2**

**850 Hvalba**

**Tlf: +298 37 50 33**

Tú hevur altíð møguleika at klaga til Dátueftirlitið, um tú ert ónøgd/-ur við okkara viðgerð av tínum persónsupplýsingum. Tú finnur kontaktupplýsingarnar hjá Dátueftirlitinum á www.dat.fo.